# Teitur Lassen við á danskari fløgu

*Danska felagið ROSA hevur tikið tveir sangir hjá Teitur Lassen við á eina fløgu, sum skal marknaðarføra danskan tónleik í útlandinum*

*Eyðun Klakstein*

Fyrrverandi sangarin í føroyska rockbólkinum Mark No Limits stendur nú á egnum beinum, og tað stendur hann seg so væl við, at hann er komin við á eina fløgu, sum skal marknaðarføra danskan tónleik í útlandinum.

Tað er danska felagið ROSA (Dansk Rock Samråd), sum stendur fyri útgávuni, og sum verður send kring heimin fyri at gera reklamu fyri danskan tónleik.

Teitur Lassen er rættiliga komin inn í hitan hjá ROSA, og hann hevur áður luttikið á sokallaða Spot-festivalinum, sum felagsskapurin eisini skipar fyri.

**Vónar at kunna liva av tónleiki**

Ta ferðina gekk tað Teituri so væl, at hann næstan rodnaði, tá hann læs ummli av síni framførslu í danska dagblaðnum Politiken.

Teitur Lassen, sum er í Føroyum í løtuni, ætlar sær at satsa uppá tónleikin næstu tíðina.

– Eg gjørdi nógv við tónleikin, tá eg spældi í Mark No Limits, og eisini eftir at vit góvust við bólkinum, havi eg brúkt nógva tíð uppá tónleik. Nú ætli eg mær at finna út av, um eg kann liva av tónleikinum, sigur Teitur Lassen.

Hann er spentur uppá, hvat fløgan hjá ROSA kann avrikað í útlandinum, men í øllum førðum ætlar hann at leggja seg eftir at koma fram sum sangari og sangskrivari.



*Nú ætli eg mær at finna út av, um eg kann liva av tónleikinum, sigur Teitur Lassen, fyrrverandi sangari í bólkinum Mark No Limits*

## Veðrið



**Fimm-daga-forsøgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri og stundum sirm. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av vestri og regn ella mjørki av og á. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri og útnyrðingi, stundum upp í hvassan vind. Sirm og mjørki av og á og hitin millum 4 og 8 stig.

– – –

Desember mánaði var bæði kaldur og turrur, miðalhitin varð 2,2° móti 3,8, og avfallið varð 108,3 mm móti vanliga 175,4 mm




Brúgvaløgini vestanfyri Ísland fara eystureftir og hava lýggjari veður við sær.




Hátrýstið vestanfyri Írland stendur mestsum í stað og gevur liggjandi vestanveður við Føroyar.




**Hitalagið mált frá 12./01. kl 06⁰⁰–13./01. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 3,1°C**
Minsti hiti máldur í jan.: **÷8,8°** Mesti hiti máldur í jan.: **11,6°**




Avfallið: 9,0 mm – **mált frá 12./01. kl 6⁰⁰–13./01. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í januar: 108,3 mm

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷4 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | ÷8 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | ÷2 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 3 |
| Aberdeen | 4 |
| London | 7 |
| Tromsø | 1 |
| Bergen | 4 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 5 |
| Keypmannahavn | 3 |
| Helsinki | 3 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 0 |
| Warzawa | 1 |
| Kiev | ÷4 |
| Bukarest | ÷1 |
| Paris | 0 |
| Madrid | 5 |
| Róm | 10 |
| Malorca | 11 |
| Athen | 8 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 14 |
| Beijing | ÷3 |
| New Dehli | 17 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | – |
| New York | 8 |
| Miami | 24 |
| Los Angeles | 14 |
| Meksikobýur | 18 |
| Panama | – |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 34 |

### Vestfalskyrrindi

6. januar: Tendring
14. januar: Fyrra kvarter
19. januar: Mánin næstur jørðini

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/Sundalagnum fp | sp | Vestmannasundi fp | sp | Mykinesfirði fp | sp | Nólsoyarfirði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp | sp | Hvannasundi fp | sp | Fugloyarfirði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 14. jan. | 1109 | 2340 | 1009 | 2240 | 1024 | 2255 | 0043 | 1309 | 0143 | 1409 | 0924 | 2155 | 0824 | 2055 | 1124 | 2355 | – | 1224 | 1054 | 2325 | – | 1209 |
| 15. jan. | – | 1215 | 1115 | 2357 | 1130 | – | 0140 | 1415 | 0240 | 1515 | 1030 | 2312 | 0930 | 2212 | – | 1230 | 0055 | 1330 | – | 1200 | 0040 | 1315 |
| 16. jan. | 0057 | 1342 | – | 1242 | 0012 | 1257 | 0257 | 1542 | 0357 | 1642 | 1157 | – | 1057 | 2343 | 0112 | 1357 | 0212 | 1457 | 0042 | 1327 | 0157 | 1442 |
| 17. jan. | 0228 | 1512 | 0128 | 1412 | 0143 | 1427 | 0428 | 1712 | 0528 | 1812 | 0043 | 1327 | – | 1227 | 0243 | 1527 | 0343 | 1627 | 0213 | 1457 | 0328 | 1612 |

TURRIKLÆÐI, HÚGVUR, T-SHIRT, KEPPAR og FLØGG




12. MAÐUR
Tlf. 213212




fk

sosialurin
Altið fyrst við
www.sosialurin.fo

BILLUTIR



ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666